

## Minni landbúnaðarstuðul

OECD vil hava íslendsku politikararnar at skerja tann almenna stuðulin til landbúnaðin. Í einari nýggjari frágreiðing verður víst á, at tann almenni stuðulin svarar til 61 prosent av bruttoinntøkuni hjá íslendska landbúnaðinum, og tað er næstan tríggjar ferðir meiri enn meðalstuðulin í OECD-londunum. Hann er 23 prosent. Norskir og svenskir bóndur fáa næstan líka nógvan almennan stuðul sum teir íslendsku. Í Noregi svarar stuðulin til 53 prosent av bruttoinmntøkuni hjá landbúnaðinum, og í Svøríki er talið 50 prosent. Minsti landbúnaðarstuðulin er í Ný Sælandi, har bara eitt prosent av bruttoinntøkuni stavar frá almennum stuðuli.

## Sjey neyðtøkuroyndir

Teir seinastu tríggjar mánaðirnar hevur løgreglan í danska býnum Grenå fingið fráboðan frá sjey kvinnum, sum hava verið fyri neyðtøkuroynd, og nú heldur løgreglan, at tað er sami maður, sum hevur roynt at neyðtaka allar sjey kvinnurnar. Ta seinastu fráboðanina fekk løgreglan um vikuskiftið, tá ein 19 ára gomul kvinna boðaði frá, at ein maður hevði roynt at neyðtaka seg. Kvinnan hevði gjørt so nógva mótstøðu, at maðurin gavst og tók til rýmingar. Løgreglan í Grenå hevur nú biðið fólkið í býnum um hjálp, so hon kann fáa fatur á neyðtøkumanninum, skrivar DR.

# Lív umsitir 2,8 miljardir í kapitali

**Tummas Eliasen, stjóri í Lív og í íløgufelagnum Royndini, segði á vinnutingi í Fuglafirði, at Lív hevur møguleikan at seta meira pening í føroyskt vinnulív, og sum er fara umleið 2% av íløgunum til vinnulívsfígging**

VINNUTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag skipaði Eysturoyar Vinnulívsfelag fyri vinnutingi, sum felagið hesaferð helt á Vónini í Fuglafirði.

Á vinnutinginum vóru tríggjar framløgur, harav Tummas Eliasen, stjóri í Lív, hevði eina av framløgunum.

Á vinnutinginum greiddi Tummas Eliasen, stjóri í Lív og í íløgufelagnum Royndini frá eftirlønartryggingum og um pensjónskapital í vinnulívi.

Tummas segði, at Lív í dag umsitir 2,8 miljardir krónur í pensjónskapitali, harav 1,4 miljardir krónur standa í donskum lánsbrøvum, 20% í partabrøvum og 10% í øðrum.

Stjóri í Lív segði, at pens jónstryggingarfelagið hevur møguleikan at seta meira pening í føroyskt vinnulív, og sum er, fara umleið 2% av íløgunum til vinnulívsfígging.

Stjórin vísti á, at fleiri av íløgunum í vinnulív hava givið góð avkøst og hava enntá rindað seg upp til fleiri ferðir aftur. Í einstøkum føri hevur íløgan ikki eydnast serliga væl.

- Eitt pensjónfelag eigur sjálvandi altíð at royna at tryggja sær, at íløgur eru tryggar, samstundis sum avkastið er størst møguligt, segði Tummas Eliasen, stjóri í Lív.

Sosialurin fer at venda aftur til ymiskt av tí, sum stjórin í Lív segði á vinnutinginum, í øðrum blað í vikuni.

Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini, greiddi frá, hvussu fyritøkan, sum byrjaði við nøkrum fáum monnum í Fuglafirði fyri umleið 40 árum síðan, í dag hevur ein samlaðan umsetning saman við norska felagnum RFG upp á 320 miljónir krónur, harav árligi útflutningurin bara úr Føroyum er 93 miljónir krónur.

Tað var annars í fjør, at Vónin og RFG í Noregi løgdu saman, og í dag telist samlaða samtakið millum størstu útbjóðarar av trolreiðskapi í Norðuratlantshavi.

Páll Isholm, deildarstjóri og komandi blaðstjóri, greiddi frá verkætlanini við einum nýggjum vinnublað, sum fer at kallast Vinnan. Tað er Sansir, ið fara at standa sum útgevarar, og tað eru eisini Sansir, sum geva út blaðið, Kvinna.

Páll Isholm segði, at Vinnan fer at geva vinnulívinum eitt betri grundarlag at taka avgerðir á.

Meira verður at lesa í Sosialinum um vinnutingið hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag í hesi vikuni.



*Millum tær tríggjar framløgurnar, sum vóru á vinnutinginum í Fuglafirði fríggjadagin, hevði Tummas Eliasen, stjóri í Lív, ta einu. Her prátar hann við ein av vinnulívsmonnunum í Eysturoy í steðginum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Høgur miðalprísur á Fiskamarknaðinum

**Størstu nøgdirnar á uppboðssøluni í dag var aftur toskur 3 og 4**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tilsamans 36,4 tons vórðu seld um søluna hjá Fiskamarknaði Føroya í morgun.

Størstu nøgdirnar vóru enn einaferð av toski 4, sum fór fyri miðalprísin 10 krónur og 78 oyru.

Næst størstu nøgdirnar vóru av toski 3, sum fór fyri miðalprísin 15 krónur og 38 oyru.

Nøkur fá tons av hýsu vórðu eisini seld um uppboðssøluna í morgun og besta miðalprísin, sum var 14 krónur og 16 oyru, fekk hýsa 1.

Miðalprísurin fyri øll 36,4 tonsini í dag var 17 krónur og 26 oyru.

Tað vóru serliga nøgdirnar av havtasku, sum hálaðu miðalprísin upp. Besta havtaskan fór til miðalprísin 34 krónur og 58 oyru.

Besti toskaprísurin var 25 krónur og 40 oyru fyri kilo, og lægsti prísur í dag var 2 krónur og 30 oyru, sum var fyri skøtu.



*Miðalprísurin fyri øll seld fiskasløg á Fiskamarknaði Føroya í morgun var 17,26 krónur fyri kilo*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*